Samstarv vi› Sambands- og Sjálvst‡risflokk hugar Javna›arflokkinum

– Ta› er heilt t‡›uligt, at ein meiriluti av bæ›i sambands- og javna›arveljarunum helst sær, at ein samgonga millum Javna›arflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvst‡risflokkin er veruleiki eftir næsta val. Ta› er ein samgonga, sum avgjørt tiltalar Javna›arflokkin, serstakliga nú Sambandsflokkurin hevur víst seg vilja flyta seg í sjálvst‡risspurninginum

VELJARAKANNING
Jan Müller

– Hetta er ein gó› kanning fyri Javna›arflokkin. Vit hava ligi› stabilir millum 24 og 25% vi› tær seinastu kanningarnar, tvs. at framgongdin sí›ani seinasta val uppá 2,5% er komin fyri at ver›a. Ta› er sera hugaligt at liggja á einum ø›rum plássi, nú vit skjótt fara at nærkast endaspurtinum til komandi val. Tá veit man, hvat fari› ver›ur eftir sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur í Javna›arflokkinum, sum eisini heldur, at henda veljarakanningin gevur flokkinum áræ›i til framhaldandi at strí›ast fyri síni søk.

Kanningin, sum her ver›ur sipa› til, ver›ur almannakunngjørd í n‡ggja vikubla›num FREGNIR í gjár. Fynd hevur gjørt kanningina fyri bla›i›.

Vit spurdu formannin í Javna›arflokkinum, hvat flokkurin kann brúka úrsliti› av veljarakanningini til!

– Vit fara at brúka úrsliti› til fyrst og fremst at mobilisera egna styrki og at markera okkum meira, nú ta› nærkast valinum.

At Tjó›veldisflokkurin framvegis er størsti flokkur heldur Jóannes Eidesgaard vera tí, at tjó›veldisfólk eru tjó›veldisfólk líkamiki›, hvat enn hendir í samfelagnum. – Ta› skerst so heldur ikki burtur, at Tjó›veldisflokkurin hevur sína glæstrití› beint nú. Men nú byrjar so spakuliga at flata út hjá flokkinum sammeta vit vi› seinastu veljarakanningina.

Veljarakanningin vísir eisini, at flestu javna›arveljarar vilja samstarva vi› Sambandsflokkin og øvugt. Gevir ta› Jóannesi Eidesgaard nakra ábending um samgongumøguleikar eftir vali›!

– Ta› er heilt t‡›uligt, at ein meiriluti av bæ›i sambands- og javna›arveljarunum helst sær, at ein samgonga millum Javna›arflokkin, Sambandsflokkin og Sjálvst‡risflokkin er veruleiki eftir næsta val. Ta› er ein samgonga, sum avgjørt tiltalar Javna›arflokkin, serstakliga nú Sambandsflokkurin hevur víst seg vilja flyta seg í sjálvst‡risspurninginum. Og nú Sambandsflokkurin er ein sosial-liberalur flokkur, hví skuldu vit tá ikki eisini kunna samstarva vi› hann um tann sosiala og tann búskaparliga politikkin!

– Tú sær ikki fyri tær tann møguleika, at Tjó›veldisflokkurin og Javna›arflokkurin kunnu fara at nærkast meira og møguliga skipa samgongu eftir vali›, nú Tjó›veldisflokkurin í seinastuni hevur melda› út ta› sama sum Javna›arflokkurin í fleiri heimligum málum?

– Hyggja vit eftir tølunum frá kanningini, so er ta› t‡›uligt, at tjó›veldis›veljarar venda Javna›arflokkinum baki›, og ta› mugu vit taka til eftirtektar.



Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins: - Hetta er ein sera hugalig veljarakanning fyri Javna›arflokkin
Mynd Jan Müller

Avlei›ingar ógrei›ar

– Nú sigur ein meiriluti ja til ætlanina at minka um blokkin vi› 400 mill. kr. frá 2002!

– Vit mugu taka til okkum, at vit hava ikki gjørt okkum tann ney›uga ómakin til at grei›a frá, hvørjar búskaparligu fylgjurnar eru av hesum. Vit hava so vi› vilja valt at bí›a vi› hesum, til vit hava skriva› okkara álit í Uttanlandsnevndini. Tá koma vit fram vi›, hvat hetta fer at merkja sigur Jóannes Eidesgaard, sum vísir á, at landsst‡ri› manglar próvbyr›una fyri, hvørjar avlei›ingarnar ver›a, um 400 mill. ver›a tiknar av blokkinum.

– Ta› skyldar landsst‡ri› Føroya fólki eitt svar uppá. Ta› er ov romantiskt at siga, at man tekur 400 mill. kr. av og einki siga um, hvat so hendir. Vit í andstø›uni mugu tí til at greina út, hvørjar avlei›ingarnar ver›a og ta› fara vit at gera.

Annars er forma›ur Javna›arfloksins eitt sindur ørkymla›ur av veljarakanningini, tá 51% vilja hava fullveldi og umlei› sama tal ynskir at vera innan fyri Ríkisfelagsskapin.

Fólkaflokkurin stendur seg sum hann plagar

Løgma›ur hevur tí onga orsøk til at vera ónøgdur vi› veljarakanning

VELJARAKANNING
Jan Müller

– Vit plaga ongantí› at fáa meira enn seks tingmenn vi› eina veljarakanning og plaga at liggja um tey 17-18%, so eg hava onga orsøk til at vera ónøgdur sigur Anfinn Kallsberg, løgma›ur í eini vi›merking til veljarakanningina, sum Fynd hevur gjørt fyri vikubla›i› FREGNIR. Serstakliga ikki aftaná allan tann turbulensin, sum hevur veri› í sjálvst‡rismálinum hesa sí›stu tí›ina.

Løgma›ur sigur, at hann hevur ikki havt stundir at kunna seg nóg nógv vi› kanningina til at gera stórvegis vi›merkingar nú.

Vit spurdu Anfinn Kallsberg, um ein orsøk til, at løgma›ur ikki torir at skriva út n‡val, nú ta› hevur veri› so turbulent í samgonguni, er tann, at hann ber ótta fyri einum ov vánaligum úrsliti fyri Fólkaflokkin!

– Løgma›ur skrivar ikki út n‡val. Eg eri av tí sannføring, at tá ein valskei› er uppá 4 ár, so eiga vit eisini at halda okkum til ta›. Og løgma›ur fer so ikki at skriva út naka› val nú orsaka› av veljarakanningum ella gongdini í samgonguni.

Hann sigur eisini, at skuldi ta› hent, at t.d. Tjó›veldsiflokkurin tók seg úr samgonguni, so ver›ur ikki talan um at halda fram sum minnilutast‡ri. -Ta› hava vit enn ikki nóg gó›a tradition fyri, og tí mugu ganga fleiri valskei›, á›renn politiska skipanin venur seg til at arbei›a vi› minnilutast‡rum. Løgma›ur vil ikki siga, hvat hann fer at gera, um flokkar taka seg úr landsst‡rinum.

Anfinn Kallsberg vi›gongur annars enn einafer›, at stevi› í samgonguni er ikki nóg gott. Um andstø›uuppskoti›, sum var› til 3. vi›ger› í gjár, sigur løgma›ur, at hetta uppskoti› er í samsvar vi› samgonguskjali›, og at ta› bara er spell, at ta› ikki er samgongan, sum fremur ta›. At ta› skal vera gjørt til eitt kardinalpunkt harmar hann.



Anfinn Kallsberg

Høgni Hoydal, forma›ur Tjó›veldisfloksins:

Fegnast um undirtøkuna fyri fullveldi

– Eg haldi, at vit hava sæ› eitt veruligt lop í føroyska veljaraskaranum í sambandi vi› fullveldisspurningin, sigur Høgni Hoydal, sum tó ásannar, at samgongan kundi havt greitt máli› betri úr hondum

VELJARAKANNING
Stefan í Skorini

N‡ggjasta veljarakanningin hjá Fregnum vísir, at Tjó›veldisflokkurin hevur eina framgongd uppá 2,1 prosent, men fær ikki nakran tinglim afturat teimum átta.

Høgni Hoydal sigur, at hann fegnast fyrst og fremst um tey úrslit, sum hava vi› fullveldi at gera, tí tey vísa, at føroyski veljaraskarin hevur flutt seg í hesum málinum. Hetta er ein tendensur, sum eisini vísti seg í seinastu veljarakanningini.

Vi› tí vísir Høgni á, at 51,5% siga seg taka undir vi›, at Føroyar ver›a skipa›ar sum land vi› fullveldi. Eisini fegnast hann um, at ein stórur meiriluti heldur, at Føroyar eiga fullan rætt at virka í millumtjó›a politikki.



Høgni Hoydal heldur, at vit í tí n‡ggjastu kanningini hjá Fregnum hava sæ› eitt veruligt lop í tí føroyska veljaraskaranum, tí ein meiriluti tekur undir vi› at skipa Føroyar sum land vi› fullveldi.

Kundi gjørt ta› betur

Veljarakanningin vísir eisini, at bara 41,8% siga ja til uppskoti› hjá landsst‡rinum um sjálvst‡ri, me›an 45,8 siga nei. Høgni Hoydal metir tó ikki, at landsst‡ri› er á skeivari lei›.

Orsøkina heldur Høgni vera, at ta› hava veri› ymsar útmeldingar í hesum málinum frá landsst‡rinum. Tí hava styrkin og trú›vir›i um hesa gongdina veri› heldur ivasom. Ta› ávirkar eisini eina veljarakanning.

Høgni vísir hinvegin á, at ein meiriluti í kanningini tekur undir vi›, at blokkurin ver›ur minka›ur, og at Føroyar skulu skipast sum fullveldi, og ta› tekur hann sum eina álitisváttan til landsst‡ri›.

– Hetta er gó›ur lesna›ur sæ› í ljósinum av, at naka› rumbli hevur veri› um máli›, og ta› er alney›ugt at fólk hava álit á politisku skipanini, sigur Høgni Hoydal.

Ein andsøgn í kanningini er, at 51,5% taka undir vi›, at Føroyar gerast land vi› fullveldi, me›an 51,4 % taka undir vi›, at Føroyar vera verandi í danska ríkinum.

Løgtingsvali› avgerandi

– Vit fara til val uppá gjøgnumføra fullveldistilgongdina, og teir flokkar, sum taka undir vi› hesum, eru natúrligu samstarvsflokkarnir hjá Tjó›veldisflokkinum, sigur Høgni Hoydal.

Høgni heldur, at løgtingsvali› komandi ár ver›ur eitt slag av fólkaatkvø›u um fullveldistilgongdina, tí um ein onnur samgonga kemur til valdi›, kann hon ste›ga hesi gongdini.

Hjá Tjó›veldisflokkinum eru 67,5% av veljarunum, sum vilja samstarva vi› Fólkaflokkin, og tí er hesin flokkur upplagdi samstarvsfelagin hjá Tjó›veldisflokkinum.

Í føroyskum politikki í dag eru tveir blokkar, men Høgni Hoydal sigur, at flokkarnir fara til vali› sum einstakir flokkar, men hann vísir á, at so leingi sum fullveldismáli› ikki er avgreitt, so ver›ur mynstri›, at tveir sterkir blokkar mynda føroyskan politikk.

Tí er ta› umrá›andi, at mann fær avgreitt ta ríkisrættarligu stø›una og sta›fest fullveldi›, so at flokkarnir kunnu n‡ta alla sína orku uppá teir meira samfelagsligu spurningarnar, heldur Høgni Hoydal, sum annars fegnast um úrsliti› av veljarakanningini.

Lisbeth L. Petersen, forma›ur Sambandsfloksins:

– Undirtøkan skal vera enn størri

N‡kosna forkvinna Sambandsfloksins, Lisbeth L. Petersen, er gla› um, at flokkur hennara gongur fram vi› einum tinglimi í n‡ggjastu veljarakanningini hjá Fregnum, men hon er tó ikki heilt nøgd, tí undirtøkan skal vaksa enn meira, sigur hon

VELJARAKANNING
Stefan í Skorini

Sambandsflokkurin hevur eina framgongd uppá 3,2% í mun til seinasta løgtingsval, úr 18% uppí 21,2%. Hetta gevur flokkinum ein tinglim afturat, so at hann sambært kanningini fær sjey tinglimir.

– Hetta er eitt pent tal samanbori› vi› seinasta val, sum var vánaligt hjá Sambandsflokkinum, men undirtøkan skal blíva enn størri. Eg eri tó gla› um, at flokkurin hevur framgongd, sigur Lisbeth L. Petersen.

Hon heldur, at teirra bo›skapur er komin væl út til fólki›. Nú skal flokkurin koma klárari út til fólki› vi› sínum sjónarmi›um.

Lisbeth metir hinvegin ikki, at veljarar hjá sjálvst‡risvonginum hava fingi› sannleikan at vita.

– Ta› ver›ur sagt, at vit kunnu var›veita sama samfelagi› eftir fullveldistøkuna, men ta› ver›ur ikki so, sigur Lisbeth, sum leggur samgonguna undir at bera veljarunum ósannindi í fullveldismálinum. Hetta er kjarnin í sjálvst‡rismálinum, heldur hon.

Lisbeth L. Petersen heldur, at veljarar hjá sjálvst‡risvonginum ikki hava fingi› sannleikan at vita, og hon heldur at mest natúrliga samstarvi› er millum Sambandsflokkin og Javna›arflokkin eftir næsta val

Lítla undirtøku sum løgma›ur

Í kanningini ver›a fólk eisini spurd um teirra besta bo› upp á løgmann. Har fær Lisbeth L. Petersen bara 7,7 prosent, me›an fráfarni forma›urin, Edmund Joensen, fær ni›anfyri tey 5 prosentini. Formenninir í hinum flokkunum hava væl betri undirtøku.

Næstan 30 prosent vísa á Anfinn Kallsberg sum besta bo›i›, me›an Jóannes Eidesgaard fær beint omanfyri 15 prosent, og Høgni Hoydal fær beint ni›anfyri 15 prosent.

Hetta kundi bent á, at Sambandsflokkurin framvegis ikki kann vísa á eitt løgmansevni, sum hevur stóra undirtøku í fólkinum.

– Vit hava enn ikki tosa› um eitt løgmansevni í flokkinum, men vit hava ongan trupulleika vi› hesum, tí ta› ver›ur avgreitt til næsta val, sigur Lisbeth.

Lisbeth sigur hinvegin, at fær Sambandsflokkurin stóra undirtøku til næsta val, so vil flokkurin hava løgmannin.

Til ta stóru undirtøkuna hjá løgmanni sigur Lisbeth, at orsøkin er ikki, at hann er tann besti løgma›urin, vit eiga, men undirtøkan kemst heldur av, at hann situr í sessinum framman-undan.

Kampvali› ikki ringa ávirkan

Sambandsflokkurin hevur fingi› frægari undirtøku í ø›rum veljarakanningum, sum hava veri› gjørdar í seinastuni. Ta› kundi tí bent á, at kampvali› millum Edmund Joensen og Lisbeth L. Petersen hevur havt ringa ávirkan á flokkin.

– Eg haldi ikki, at kampvali› hevur havt ringa ávirkan á flokkin, tí vit arbei›a jú fyri somu søk. Vit hava spælt vi› opnum kortum í sambandi vi› vali› allatí›ina, so ta› skuldi ikki skatt flokkin naka›. Ta› er jú vanligt at skifta formann av og á, sigur Lisbeth L. Petersen.

Til næsta val heldur Lisbeth, at ta› mest natúrliga samstarvi› er vi› Javna›arflokkin, og ta› vísir veljarin hjá Sambandsflokkinum eisini á.

– Ta› eru bara tveir flokkar, sum hava melda› út, at teir vilja vera í ríkisfelagsskapinum, og tí bindur hetta máli› Sambandsflokkin og Javna›arflokkin saman. Ta› mest natúrliga samstarvi› er sostatt millum hesar bá›ar flokkarnar, vísir Lisbeth L. Petersen á.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 XL AUTOMATIK Skrás.: 07-10-92 Km.: 193.000 Prísur: 87.600,- (Sýnaður 03-00)	**TOYOTA COROLLA 1,3 XLI** Skrás.: 09-10-95 Km.: 173.000 Prísur: 65.600,-
TOYOTA CAMRY 2,0 GLI Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 58.600,- (Sýnaður 10-00)	**TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN** Skrás.: 06-08-90 Km.: 229.000 Prísur: 38.600,-
TOYOTA CARINA E 1,6 GXI L/B Skrás.: 09-11-95 Km.: 87.000 Prísur: 107.600,- Garanti* (Sýnaður 04-00)	**HONDA ACCORD 2,0 LS** Skrás.: 18-06-97 Km.: 113.000 Prísur: 135.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* (Sýnaður 03-00)	**FORD KA** Skrás.: 04-06-97 Km.: 69.000 Prísur: 65.600,-
TOYOTA CARINA 1,6 L/B Skrás.: 28-03-89 Km.: 165.000 Prísur: 48.600,- Garanti*	**DAIHATSU SIRION 5 H AUTOM.** Skrás.: 30-06-99 Km.: 22.000 Prísur: 112.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 GL Skrás.: 31-08-89 Km.: 181.000 Prísur: 42.600,- (Sýnaður 03-00)	**FIAT CINQUECENTO 170** Skrás.: 19-08-97 Km.: 42.000 Prísur: 49.600,-
TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL Skrás.: 17-11-98 Km.: 53.000 Prísur: 134.600,- Garanti**	**BMW 320 I** Skrás.: 06-04-90 Km.: 137.000 Prísur: 57.600,- (Sýnaður 12-00)
TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN Skrás.: 14-04-00 Km.: 27.000 Prísur: 136.600,- Garanti**	**VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 42.600,- (Sýnaður 06-99)
TOYOTA COROLLA 1,9 DIESEL STW. Skrás.: 20-07-00 Km.: 11.000 Prísur: 164.600,- Garanti**	**OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B Skrás.: 25-01-99 Km.: 28.000 Prísur: 112.600,- Garanti**	**CITROEN SAXO 1,5 DIESEL** Skrás.: 08-04-98 Km.: 52.000 Prísur: 87.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA H/B Skrás.: 15-03-99 Km.: 45.000 Prísur: 107.600,- Garanti**	**CITROEN XANTIA DIESEL** Skrás.: 01-06-95 Km.: 266.000 Prísur: 69.600,- (Sýnaður 03-01)
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B AUTOM. Skrás.: 21-07-97 Km.: 38.000 Prísur: 98.600,- Garanti* (Sýnaður 03-01)	**FORD ESCORT 1,8 DIESEL** Skrás.: 16-08-91 Km.: 134.000 Prísur: 35.600,- (Sýnaður 01-01)
TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA H/B Skrás.: 30-08-95 Km.: 74.000 Prísur: 75.600,- Garanti* (Sýnaður 11-00)	**FORD ESCORT 1,8 DIESEL** Skrás.: 23-05-96 Km.: 90.000 Prísur: 82.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti**	**DAEWOO NEXIA 3 HURÐAR** Skrás.: 13-11-97 Km.: 53.000 Prísur: 48.600,-
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur: 114.600,-Garanti**	* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN ** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

www.reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820